Álit

í

løgtingsmáli nr. 46/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Leingja tíðarskeiðið fyri fulla endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við íløgur í hitapumpuskipanir til eisini at fevna um 2024)

Beinir Johannesen, tingmaður, hevur vegna Fólkaflokkin lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 16. november 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22., 23. og 30. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu, Hanna Jensen og Steffan Klein Poulsen) tekur ikki undir við málinum, men hevur ymiskar viðmerkingar.

Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen hava hesar viðmerkingar:

Undirritaðu halda, at uppskotið er gott og staðfestir, at full semja er um tann partin av uppskotinum, sum snýr seg um at leingja skipanina við mvg-afturbering eitt ár, so at full afturbering eisini verður í 2024. Tað er eisini í samsvari við átak nr. 13 um mvg-frítøku til góðkendar hitapumpur í samtykta veðurlagspolitikkinum.

Nevndin er undir viðgerðini kunnað um, at landsstýriskvinnan í næstum kemur við einum uppskoti, sum júst leingir fullu afturberingina fyri 2024. Tað uppskotið hevur verið til hoyringar, og sambært tí verður niðurlaðingin av afturberingini gjørd lagaligari við at taka fjórðingin av hvørt ár frá 2025, so at skipanin við afturbering endar í 2028 í mun til fyriliggjandi uppskot, har niðurlaðingin er heldur brádligari og minkar við eini helvt í 2025 og endar í 2026.

Sjálv leingingin hevur undir øllum umstøðum neiligar umsitingarligar avleiðingar fyri almennar myndugleikar.

Tá nú nevndin er vitandi um, at uppskot verður lagt fyri tingið um neyvt somu leinging av afturberingarskipanini, sum í hesum máli verður skotið upp, umframt at afturberingin tá væntandi verður minkað meira líðandi enn í fyriliggjandi uppskoti, taka undirritaðu ikki undir við málinum.

Steffan Klein Poulsen hevur hesar viðmerkingar:

Undir viðgerðini av grønum stuðulsskipanum í nevndini er komið púra greitt fram, at stórar upphæddir fara úr landskassanum og í lummarnar á teimum, sum eru væl fyri og hava ráð til at gera dýru íløgurnar í grøna orku.

Tær grønu stuðulsskipanirnar venda tí sosialt á høvdinum.

Rættast hevði verið at latið tøknina og marknaðarkreftirnar borið okkum fram á grønu leiðini, heldur enn at brúka so stórar upphæddir uppá stuðul.

Harumframt er Fíggjarnevndin upplýst um, at TAKS ikki hevur automatiskar skipanir til at viðgera nógvu umsóknirnar um grønan stuðul. Tær verða gjøgnumgingnar ein og ein. Hetta fer tí við nógvari tíð og orku hjá TAKS.

Galdandi frítøkuskipan fyri hitapumpur hevur gildi fram til 2025. Átak 13 í samtykta veðurlagspolitikkinum ljóðar soleiðis: "*MVG frítøka til góðkendar hitapumpur: Verandi frítøkuskipan heldur fram til 2025, tá skipanin verður endurskoðað*.".

Tað er tí í samsvari við samtykta veðurlagspolitikkin at lata galdandi lóg standa óbroytta og harvið lata frítøkuskipanina ganga út aftaná 2025.

Undirritaði mælir til, at Løgtingið heldur seg til verandi frítøkuskipan og frámælir harvið bæði at leingja og økja sosialt skeiva stuðulin, sum Fólkaflokkurin við hesum uppskoti og landsstýriskvinnan í fíggjarmálum við einum komandi uppskoti leggja upp til.

Við hesum ymisku viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen og Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Sambært galdandi lóg minkar mvg-afturberingin til hitapumpuskipanir í 2024 niður í helvt fyri síðani at falla burtur í 2026.

Hetta uppskotið hevur til endamáls at broyta skipanina til eina fulla afturbering av meirvirðisgjaldinum í 2024 fyri síðani at minka niður í helvt í 2025. Eins og við galdandi lóg verður eingin mvg-afturbering í 2026 og fylgjandi ár.

Tað eru orsakir til, at fulla afturberingin eigur at halda fram í 2024.

Í orku- og veðurlagspolitikkinum, ið er samtyktur á Løgtingi, bleiv sagt, at skipanin eigur at halda fram til 2025 og tá at verða eftirmett.

Støðan nú er tann, at fleiri kommunur steðgaðu á við jarðhitaboringunum - av givnum ávum - í eitt rímiliga langt tíðarskeið. Hetta hevur elvt til, at fólk eru sett í bíðistøðu at fáa gjørt hesa íløgu.

Bíðistøðan ger, at fólk hava bundið seg til eina íløgu, men bíðistøðan ger eisini, at fortreytirnar broytast, og tí kunnu fólk koma illa fyri av hesum. Í skrivandi stund er einki uppskot lagt fram frá landsstýrinum, sum tekur hædd fyri hesum trupulleika.

Minnilutin metir ikki, at tað er rætt, at fólk skulu koma illa fyri fíggjarliga, m.a. av politiskum avgerðum. Tí er rætt at leingja fullu endurrindanina av meirvirðisgjaldinum til 2024 afturat.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 5. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	